# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Poulina Zachariassen farin

Leygardagin 7.apríl doyði Poulina Zachariassen í Havn 86 ára gomul.

Poulina er ættað av Toftum, har hon vaks upp sum tann elsta av fimm systrum. Foreldrini vóru Anna Elisabeth og Magnus F. Mikkelsen av Toftum.

Tær gjørdust "bert" systrar heima hjá teimum. Poulina var elst og skuldi kallast Pernilla eftir ommu síni. Tá omman frætti hetta, gjørdi hon bart: Hennara ommudóttir skuldi ikki eita Pernilla! Tískil gjørdist tað Poulina.



Foreldrini bíðaðu við at kalla abbarnar upp, til synirnir komu. Men tá fjórða gentan kom, góvu tey upp, og uppkallaðu fjórðu og fimtu dóttrina eftir abbunum. T.d. er Simona, uppkallað eftir Símun á Torkilsheyggi. Hertha Michaela eitur hinum abbanum Hans Michael. Men tey gomlu kundu fyri tað vera forlipt. Undir jarðarferðini hjá Poulinu, tók Svenning av Lofti til, hvussu Petur Háberg á einum møti einaferð hevði lýst hesar systrar, sum sótu framman fyri honum, sum eina perlurøð!

Sum ung fór Poulina til Klaksvíkar at tæna hjá Jens Klæmint Isaksen, sum tá var ein av okkara týðandi vinnulívsmonnum.

Eftir kríggið flutti familjan til Havnar, har tey høvdu klædnahandilin, Magnus F. Mikkelsen Manufaktur, ella hjá Toftamanninum, sum handilin eisini varð nevndur. Hann var í húsunum hjá Honnu og Óla Christian Skála í Dr. Jacobsensgøtu, har sum Skálabúðin er í dag.

Foreldrini fluttu seinni inn aftur á Toftir at búgva, har pápin saman við øðrum í 1953 keypti skonnartina Kongshavn, til m.a. at rógva út við bátum í Grønlandi. Eftir at Kongshavn varð seld hinum partaeigarunum, fluttu foreldrini aftur til Havnar at búgva.

Poulina gekk á handilsskúla og arbeiddi m.a. á skrivstovuni hjá Ríkisumboðnum í Havn, har hon var í úti við 25 ár. Hóast hetta er langt síðani, er hon ikki gloymd. Táverandi stjóri hennara var við til jarðarferðina, og hann ber Poulinu alt gott. M.a. segði hann, at Poulina hevði eitt so óført minni. Hetta ikki minst týdning hjá tí, sum hevur við journalina at gera. Poulina arbeiddi eisini á apotekinum.

Eitt sermerki fyri Poulinu og hennara systrar er ættarkærleiki. Vit hava systkinabørn, sum er gift inn ættina hjá Poulinu. Tað var stuttligt at síggja, ikki bert hvussu systrarnar hildu saman, men tað sama er eisini galdandi fyri teirra børn, sum vit hava hitt í mongum føðingardegi. Okkara kennskapur gjørdi, at hon altíð spurdi eftir okkara børnum, og hon fylgdi við hvussu tað gekk teimum.

Poulina var trúføst. Hetta sást ikki minst í Ebenezer og Zarepta. Var nakað sum skuldi gerast, so var Poulina ein av teimum mongu konunum, sum altíð var til reiðarar at hjálpa til.

Poulina var gift Magnusi av Sandi, og tey fingu sonin John Eli. Hann er giftur við Guðrið, dóttir Andreu og Grím á Dul í Havn. Tey búgva saman við børnunum Poulinu, Magnus og Andreu í Esbjerg. Tað er tikið til, hvussu góð Poulina var við ommubørnini og eisini tey við hana.

Tað er undrunarvert, hvussu nógv John og hansara hava verið um Poulinu. Hóast tað ikki er tað mest høgliga at búgva í Havn og Esbjerg, so hava tey ferðast nærmast í "pendulfart" at vitja heim, og tey vóru eisini her, tá Poulina doyði.

Poulina kom á Ellisheimið í Havn fyri nøkrum árum síðani. Tað gekk javnt niður á bakka, og nú slapp hon, og fekk ta hvíld hon hevur uppiborið.

ó.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Ása Johansen**, fødd Jacobsen, ættað úr Vági, búsitandi í Tåstrup, andaðist 11. apríl á Herlev Sjúkrahúsi 62 ára gomul.

**Hans David Niclsen, Sørvágur** andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 12.30 úr Kedron í Sørvági. Tey, ið vilja minnast Hans David kunnu lata Zarepta eina gávu.

### Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Kristoffur S. Joensen**
Argir

andaðist og varð jarðaður.
Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar, sangkórið og Sverra fyri vakran sang.
Takk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur og kransar og gávu til Argja kirkju.
Takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Malla, Pauli og Kjartan við vamiljum**

**Dagurin**

**13. apríl. Jústinus**, deyður umleið ár 165. Heiðin maður í Sámáriu; varð upplærdur í grikskari heimspeki og fekk navnið heimspekingurin. Gjørdist kristin og varð tí tikin av døgum í Róm. Navnið merkir *hin rættvísi*.

## Konfirmantar fyri 50 árum síðani




### Fyri 50 árum síðani konfirmeraðust hesi í Hovs Kirkju

**KONFIRMATIÓN**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað var Johan Veihe, prestur, ið konfirmeraði hesi tann 14. apríl fyri 50 árum síðani.

Genturnar: Adina Hammar, Hov, Selma Veihe, Porkeri, Jónhild Hovgaard, Hov, Naomi Vilhelm, Vágur, Alfrida Hansen, Vágur, Donna Veihe, Porkeri, Armgarð Hjelm, Vágur, Jonhild Augustinussen, Vágur.

Dreingirnir: Danjal Johannes Bech, Porkeri, Hjørleif Jacobsen, Vágur, Dagfinnur Danbjørg, Porkeri, Magnus Dahl Jacobsen, Vágur, Danjal Petur Thorsteinsson, Vágur, Páll Luid, Hov, Arne Midjord, Sumba, Magnar Holm, Porkeri, Jonhard Herdalur, Vágur, Jákup Mýri, Vágur, Høgni Vestergaard, Sumba, Odd Petersen, Vágur, Henning Steenberg, Porkeri, Heini Heinesen, Porkeri.

*Myndaeigari: Jonhild Kjærbo*